Tíðindaskriv eftir Sandavágsrenningina 5. apríl 2003

# 120 fólk runnu í Sandavági leygardagin

RENNING
*Tíðindaskriv*

Eini 120 fólk tóku lut í rennikapping í Sandavági leygardagin. Umstøðurnar at renna vóru góðar - lýtt og turt fyri tað mesta. Kappast varð í 10 ymsum bólkum hjá konufólki og mannfólki. Tey fyrstu trý í hvørjum bólki fingu heiðursmerki, ið vóru gjørd úr gróti úr Vágatunlinum.

Hetta vóru heiðursmerki, ið upprunaliga vóru gjørd til stóra motiónstiltakið í Vágatunlinum, beint áðrenn hann varð latin upp fyri ferðslu. Tí kundu bert tey taka lut, ið høvdu verið við til hitt tiltakið.

Hjá monnunum vann Hallur Holm úr Havn, frammanfyri Símun Joensen úr Klaksvík og Sigurð Justinussen av Argjum. Rigmor N. Arge vann hjá kvinnunum frammanfyri Tordis D. Eiriksfoss og Gyðu Skaale Johansen. Tær eru allar úr Havn.

Kappast var eisini í einum veteranbólki. Hjá monnunum vann Steindor Hjaltalin frammanfyri Robert Vilhelmsen og Henning C. Poulsen. Teir eru allir úr Havn. Hjá veterankvinnunum vann Jóngerð Høgnesen úr Havn frammanfyri Hansinu á Plógv úr Sandavági og Mariu Vilhelmsen úr Havn.



Úrslitini hjá børnum vóru annars hesi:

**Gentur -7 ár**
1. Anna Jákupsdóttir Tórshavn
2. Ingibjørg Petersen Tórshavn
3. Milja Skaale, Tórshavn

**Dreingir -7 ár**
1. John Viljam Johannesen Klaksvík
2. Sølvi Egilsson Sandavágur
3. Regin Joensen Tórshavn

**Gentur -10 ár**
1. Vár Gregersen Sandavágur
2. Vilbjørg Johannesen Klaksvík
3. Maria Samuelsen Sandavágur

**Dreingir -10 ár**
1. Ari Johannesen, Argir
2. Eli Falkvard Nielsen Sandavágur
3. Rógvi E. Nielsen Sandavágur

**Gentur -13 ár**
1. Jona Ásvør Samuelsen Sandavágur
2. Christa R. Weihe Tórshavn
3. Lív í Soylu, Sandavágur

**Dreingir -13 ár**
1. Bárður Johannesen Argir
2. Jan Elmar Sørensen Klaksvík
3. Bjartur Olsen, Argir

**Gentur -17 ár**
1. Sarita Hansen Miðvágur
2. Ella Joensen, Kollafjørð
3. Fía Selma Nielsen Sandavágur

**Dreingir -17 ár**
1. Jóan Karl Joensen Kollafjørð
2. Jón Gregersen Sandavágur
3. Bergur Dam Jensen Kollafjørður

Við Ítróttarkvøðu
Frælsur Ítróttur Føroya og SÍF

# Samarbeiðsavtala millum Atlantic Airways og Roklubben Neystið

*Tíðindaskriv*

26. mars 2003 gjørdist enn ein merkisdagur í stuttu søguni hjá Neystinum. Henda dagin undirskrivaðu Per Levring, statiónsleiðari frá Atlantic Airways, og Sylvia Levinsohn, formaður í Neystinum, eina samarbeiðsavtalu fyri 2003 og 2004.

Avtalan, ið varð undirskrivað í Neystinum í Ishøj Havn, inniber í stuttum, at Færø Regatta, sum í ár verður hildin fyri 16. ferð, í 2003 og 2004 eitur Atlantic Airways Færø Regatta.

Hartil kemur m. a., at allir rógvarar og øll hjálparfólk fáa nýggjar troyggjur, har búmerkini hjá Atlantic Airways og Neystinum verða skrivað á.

Avtalan, sum er komin í lag við stórari hjálp frá Børge Levinsohn, er eitt herðaklapp frá einum tí best kenda felagnum í Føroyum fyri tað arbeiðið, sum Neystið ger fyri at geva limunum møguleika at rógva kapp í tí føroyska bátinum.

Umframt róðrarárini 2003 og 2004 kann avtalan leingjast við tveimum árum.

Bæði Neystið og Atlantic Airways gleða seg til samarbeiði og vóna, at tað verður gott og gevandi.

Fyri Neystið, www.neystid.dk. Niels Salmony 26371367 og Kristvør Joensen 61374986.

# Jákup nærri málinum

**Føroyski landsliðsmálverjin roknar ikki við at verja Molde málið nú sunnudagin, men hann heldur, at ábendingar eru um, at lítið skilir hann frá plássinum**

ÚTISETI
*Jóannes Hansen*

Í vikuskiftinum verður sjøtul settur á norska kappingarárið í fótbólti. Einasti føroyingurin í bestu norsku deildini er landsliðsmálverjin Jákup Mikkelsen. Í fjør var hann fyri tað mesta á beinkinum í Molde. Um hann aftur í ár fyri tað mesta skal sita á beinkinum og hyggja at, meðan svenski Eddie Gustafosson fær høvi at verja málið, er ikki greitt enn.

Men tað er nógv, sum bendir á, at tað verður Eddie Gustafsson ella Eddie The Eagle, sum hann ofta verður nevndur í norsku pressuni, sum fer at standa í málinum, tá ið Molde sunnudagin í fyrsta umfarinum fer at spæla á útivølli. Dysturin verður í Skien ímóti Odd Grenland.

Svenski málverjin var ikki serliga sannførandi fyrsta partin av kappingarárinum í fjør, men so fór at ganga betri hjá honum. Tá ið kappingarárið var liðugt, og Molde spælararnir høvdu vunnið silvurkrónurnar, varð Eddie Gustafsson kosin at vera ársins spælari í Molde. Tí er tað torført at ímynda sær annað, enn at tað verður hann, sum fyrstur fer at fáa møguleikan.

## Jákup er tætt við

Men tað kann væl hugsast, at Jákup Mikkelsen fer at verða tikin framum svenska landsliðsmálverjan, um hesin ikki verður sannførandi fyrstu vikurnar.

Mánadagin spældi Molde síðsta venjingardystin undan kappingarbyrjan. Hann var ímóti Stabæk, sum vann 2–1. Inntil miðskeiðis í 2. hálvleiki var Molde á odda, men so skoraði mótstøðuliðið tvær ferðir eftir lítlari løtu. Og í norsku fjølmiðlunum gav svenski venjarin hjá Molde ilt av sær. Hann legði alla skuldina fyri málini á Eddie Gustafsson, og sambært VG vóru áskoðararnir á Midsund stadion samdir við venjaranum í, at málverjin hevði verið alt annað enn sannførandi. Í fyrra førinum megnaði hann bara at hálvbjarga skotroynd, og so var mótstøðumaður fyrstur á, og í seinna førinum misti hann eitt innlegg, sum so varð stútað í málið.

Venjarin var so mikið upproyttur av mistøkunum, at hann setti Jákup Mikkelsen á vøllin síðsta korterið:

– Tað plagar ikki at vera vanligt at skifta málverjan út, uttan so at hann er skaddur ella hevur fingið reyða kortið. Tað kom púra óvart á meg, at venjarin bað meg fara at hita upp, og tá ið eg hevði hitað upp í fimm minuttir, varð eg settur á vøllin, sigur Jákup Mikkelsen úr Molde. Hann leggur afturat, at hetta er dømi um, hvussu væl tað verður lagt til merkis, tá ið málverjar gera mistøk.

– Men soleiðis eru treytirnar hja málverjum. Eg fekk møguleikan í eitt korter hesa ferð. Eg rokni við, at hin málverjin fær møguleikan sunnudagin. Sjálvandi vóni eg, at venjarin velur at brúka meg, og eg kenni meg undir øllum umstøðum at vera heilt kláran, um hann vísir mær álit, sigur Jákup Mikkelsen.

Molde venjarin segði eftir síðsta venjingardystin við norskar fjølmiðlar:

– Eddie var ikki í javnvág, hann gjørdi tvey mistøk eftir lítlari løtu, og tí valdi eg at skifta hann út. Hetta er ikki serliga dramatiskt, segði Gunde Bengtsson, sum ikki vildi gera viðmerkingar til, um tað verður Eddie Gustafsson ella Jákup Mikkelsen, ið fer at verja Molde málið ímóti Odd Grenland sunnudagin kl. 17 føroyska tíð.



# Bjørt framtíð fyri føroyskari svimjing

**Tveir svimjarar fingu bronsu-nálina í SUM í Klaksvík um vikuskiftið. Landsliðsvenjarin, Petur Heðin á Fløtti, fegnast um teir nógvu ungu svimjararnar í Føroyum. Í Klaksvík vóru heili 600 einkultstartir**

SVIMJING
*Páll Holm Johannesen*



Smá unglinga meistara skapið í svimjing var í Klaksvík um vikuskiftið. Byrjað varð fríggjadagin og hildið varð á til sunnukvøldið. Yvir vikuskiftið vóru heili 600 einkultstartir. Tveir svimjarar megnaðu at røkka tíðum, sum geva atgongd FM-kappingina hjá teimum eldru seinast í apríl mánaði. Bjørg Seloy úr Havnar Svimjifelag og Hildigarð Hansen úr Skeggjum fingu báðar bronsu nálina, sum verður givið fyri at røkka FM-kappingina hjá teimum eldru.

Landsliðsvenjarin,Petur Heðin á Fløtti, fegnaðist um teir nógvu ungu og evnaríku svimjararnar, vit hava í landinum. Samstundis iðraði hann seg um, at eingi bólkamet vórðu sett, tí tað hevur verið vanligt undanfarin ár. Petur Heðin vísur á, at í løtuni er góð breidd á ungu svimjarunum, men tað vanta nøkur stjørnuskot. Hóast nøkur stjørnuskot vanta í løtuni millum tey ungu, so sigur landsliðsvenjarin seg hava gott mót um framtíðina á føroyskari svimjing.

Komandi ár verður miðað eftir at umskipa kappingarnar hjá teimum yngru. Í ár hava flestu kappingarnar verið í smáhyljum, og henda skipanin hevur ikki verið nøktandi, sigur Petur Heðin á Fløtti.

– Tá svimjararnir fyri tað mesta royna seg í stuttum hylum, so eru teir ikki vanir við at svimja í 25 metra hyljunum, og tað mugu vit royna at broyta til komandi ár, sigur landsliðsvenjarin at enda.

Samlaða støðan gjørdist:

| | Gull | Silvur | Bronsa |
|---|---|---|---|
| **Havnar Svimjifelag** | 18 | 8 | 11 |
| Skeggjar | 6 | 11 | 3 |
| Fuglafj. Svimjifelag | 4 | 3 | 3 |
| Vágs Svimjifelag | 3 | 2 | 6 |
| Flot | 1 | 6 | 4 |
| Reki | 1 | 2 | 0 |
| Ægir | 0 | 0 | 0 |
| Tvøroyrar Svimjifelag | 0 | 0 | 0 |

**Vinnararnir til SUM 2003 gjørdust:**

**100 m. frí gentur B2**
1. Bjørg Seloy HS 1.21.3
2. Hildigarð Hansen Skeggjar 1.27.1
3. Rakul Hauritz VS 1.27.7

**100 m. frí dreingir B2**
1. Høgni Miné Rasmussen HS 1.17.5
2. Sigmund hanusson HS 1.24.6
3. Per Eirikur Húsgarð Skeggjar 1.30.5

**50 m. bringa gentur B2**
1. Bjørg Seloy HS 0.43.9
2. Hildigarð Hansen Skeggjar 0.44.4
3. Rakul Hauritz VS 0.51.8

**50 m. bringa dreingir B2**
1. Jón Hofgaard VS 0.47.9
2. Høgni Miné Rasmussen HS 0.49.4
3. Sigmund Hanusson HS 0.50.1

**50 m. firvald gentur B1**
1. Gunvá Justinussen Skeggjar 0.52.7
2. Poula Ø. Mohr FS 1.12.6

**100 m. firvald gentur B2**
1. Bjørg Seloy HS 1.31.7
2. Aster Thorsen VS 1.50.8
3. Rakul Hauritz VS 1.55.4

**100 m. firvald dreingir B2**
1. Høgni Miné Rasmussen HS 1.40.0

**50 m. bringa gentur B1**
1. Helena Strøm VS 1.03.3
2. Gunvá Justinussen Skeggjar 1.03.6
3. Poula Ø. Mohr FS 1.05.8

**50 m. bringa dreingir B1**
1. Pól Mohr FS 1.05.9
2. Heðin Olsen Reki 1.06.0
3. Magnus Jákupson HS 1.18.0

**4 x 50 m. frí gentur B2**
**1. Skeggjar 1** Skeggjar 2.44.9
Shirley Cavalero
Hildigarð Hansen
Margunn Jacobsen
Sóley Strømsten
**2. Flot 1** Flot 2.45.1
Elspa Dahl Hansen
Jacoba Sevdal
Kirstin Hansen
Katrin Jacobsen
**3. HS 1** HS 2.46.2
Hildur á Fløtti
Helena Gunnarsdóttir
Guðrun H. Jacobsen
Bjørg Seloy

**4 x 50 m. frí dreingir B2**
**1. Flot 1** Flot 2.50.6
Eli Frederiksberg
Kristian Joensen
Tróndur Olsen
Jóhan Petur Petersen
**2. HS 2** HS 3.10.1
Christian Dan Sørensen
Andrias R. Hansen
Tummas Sigvardsen
Sasho Bjartason
**3. HS 3** HS 3.35.7
Einar Dam
Jógvan Jón Nicolajsen
Hanus á Tjaldrafløtti
Gunnar Garðshorn

**50 m. rygg gentur B2**
1. Bjørg Seloy HS 0.41.9
2. Hildigarð Hansen Skeggjar 0.48.0
3. Katrin Jacobsen Flot 0.48.7

**50 m. rygg dreingir B2**
1. Høgni Miné Rasmussen HS 0.40.0
2. Per Eirikur Húsgarð Skeggjar 0.45.9
3. Sigmund Hanusson HS 0.49.7

**100 m. bringa gentur B2**
1. Hildigarð Hansen Skeggjar 1.38.5
2. Bjørg Seloy HS 1.38.8
3. Rakul Hauritz VS 1.57.0

**100 m. bringa dreingir B2**
1. Jón Hofgaard VS 1.47.9
2. Sigmund Hanusson HS 1.48.3
3. Høgni Miné Rasmussen HS 1.52.1

**100 m. blandað gentur B1**
1. Gunvá Justinussen Skeggjar 1.56.8
2. Marin Petersen Skeggjar 2.05.7
3. Astrid Foldarskarð Flot 2.07.9

**100 m. blandað dreingir B1**
1. Pól Mohr FS 2.16.7

**100 m. blandað gentur B2**
1. Bjørg Seloy HS 1.27.1
2. Hildigarð Hansen Skeggjar 1.37.3
3. Aster Thorsen VS 1.44.7

**100 m. blandað dreingir B2**
1. Høgni Miné Rasmussen HS 1.33.1
2. Per Eirikur Húsgarð Skeggjar 1.42.7
3. Sigmund Hanusson HS 1.43.1

**4 x 50 m. frí gentur B1**
**1. FS** FS 3.36.8
Poula Ø. Mohr
Jónfríð Hansen
Annika Petersen
Marta Thomsen
**2. Flot** Flot 3.56.9
Astrid Foldarskarð
Jórunn Hansen
Aimee Jacobsen
Birita Debes
**3. Skeggjar** Skeggjar 4.07.4
Gunleyg Mikkelsen
Eva Petersen
Marin Petersen
Gunvá Justinussen

**4 x 50 frí dreingir B1**
**1. FS** FS 3.31.4
Benjamin Simonsen
Margeir Toftegaard
Pól Mohr
Jóhan Christiansen
**2. HS1** HS 3.36.1
Hjørtur á Fløtti
Eindri Tróndarson
Hjarnar Tórdarson
Magnus Jákupson

**50 m. frí gentur B2**
1. Bjørg Seloy HS 0.35.2
2. Hildigarð Hansen Skeggjar 0.38.9
3. Katrin Jacobsen Flot 0.39.9

**50 m. frí dreingir B2**
1. Høgni Miné Rasmussen HS 0.35.1
2. Sigmund Hanusson HS 0.37.6
3. Jóhan Petur Petersen Flot 0.39.4

**50 m. rygg gentur B1**
1. Gunvá Justinussen Skeggjar 0.54.4
2. Ruth Poulsen Reki 0.55.8
Astrid Foldarskarð Flot 0.55.8

**50 m. rygg dreinigr B1**
1. Magnus Jákupson HS 0.58.4
2. Pól Mohr FS 0.59.8
3. Benjamin Simonsen FS 1.02.6

**100 m. rygg gentur B2**
1. Bjørg Seloy HS 1.28.6
2. Rakul Hauritz VS 1.46.8
3. Aster Thorsen VS 1.48.2

**100 m. rygg dreingir B2**
1. Høgni Miné Rasmussen HS 1.28.6
2. Per Eirikur Húsgarð Skeggjar 1.43.1
3. Sigmund Hanusson HS 1.52.3

**50 m. firvald gentur B2**
1. Bjørg Seloy HS 0.39.0
2. Hildigarð Hansen Skeggjar 0.45.7
3. Hildur á Fløtti HS 0.46.9

**50 m. firvald dreingir B2**
1. Høgni Miné Rasmussen HS 0.42.5
2. Sigmund Hanusson HS 0.46.1
3. Tróndur Djurhuus HS 0.52.2

**50 m. frí gentur B1**
1. Gunvá Justinussen Skeggjar 0.45.4
2. Astrid foldarskarð Flot 0.46.6
3. Poula Ø. Mohr FS 0.47.9

**50 m. frí dreingir B1**
1. Heðin Olsen Reki 0.43.4
2. Benjamin Simonsen FS 0.47.6
3. Magnus Jákupson HS 0.48.0

**4 x 50 m. blandað gentur B2**
**1. HS** HS 3.08.8
Helena Gunnarsdóttir
Rakul Jansdóttir
Bjørg Seloy
Hildur á Fløtti
**2. Flot 1** Flot 3.14.7
Katrin Jacobsen
Kirstin Hansen
Nina Davidsen
Jacoba Sevdal
**3. Skeggjar 1** Skeggjar 3.19.3
Margunn Jacobsen
Hildigarð Hansen
Sóley Strømsten
Shirley Cavalero

**4 x 50 m. blandað dreingir B2**
**1. HS 1** HS 3.08.0
Erling Pætur á Argjagarði
Sigmundur Hanusson
Høgni Miné Rasmussen
Tróndur Djurhuus
**2. Flot 1** Flot 3.27.9
Tróndur Olsen
Uni S. Djurhuus
Kristian Joensen
Johan Petur Petersen